GÍ-EB/Streymur 0-0:

# Linligt í Gøtu

**EB/Streymur fekk javnleikin, sum teir komu eftir, og tryggjaðu sær harvið atgongd til fjórðingsfinalurnar**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Tað var bara annað liðið, sum hevði nakakð at spæla fyri, tá GÍ og EB/Streymur hittust í seinasta umfarinum í bólkaspælinum leygardagin.

Gøtumenn høvdu longu ognað sær fremsta sessin í bólkinum, og tí hevði dysturin einki at siga fyri teirra viðkomandi, og hetta merkti eisini í ávísan mun dystin. Onkrir av vanliga føstu leikarunum hava smærri skaðar at dragast við, og tí hevði venjarin valt at spara hesar, so teir heldur kunnu vera tøkir, tá GÍ fríggjadagin skal royna seg í fjórðingsfinalunum.

### Hvørgin vildi

Hjá EB/Streymi ráddi um at fáa í minsta lagi annað stigið, sum eftir øllum sannlíkindum at døma kundi tryggja teimum pláss í fjórðingsfinaluni. Sum støðan í bólkunum var, so tryggjaði hetta í øllum førum samansetta liðnum eitt triðja pláss í bólkinum, og treytað av at Skála tapti í Havn, vildi javnleikurin eisini innibera, at EB/-Streymur ikki gjørdist vánaligasti trý'arin í bólkaspælinum.

Tað var hampuliga tíðliga í dystinum greitt, at tað meira enn so kundi henda seg, at talan fór at gerast um málleysan javnleik. Gøtumenn løgdu lítið fyri í spælinum frameftir, og tó at tað kanska var meira bit í gestunum, so satsaðu teir heldur ikki alt ov nógv frameftir, av ótta fyri einum kvikum mótálopi frá vertunum.

Vandamestu málmøguleikarnir áttu gestirnir eisini, og við eitt sindur av hepni kundi Sorin Anghel tryggjað liðnum ein heldur óvæntaðan sigur, men tær ferðirnar, at vandi veruliga var á ferð, sýndi Hallur Joensen í GÍ málinum við frálíkum refleksbjargingum, at genini frá pápanum ikki eru burturspilt.



*Talan var um eina heldur linliga uppgerð, tá GÍ og EB/Streymur hittust leygardagin*
*Mynd: Jonhard Hammer*

### Torførar fjórðingsfinalur

Sum heild gjørdist talan soleiðis um eina heldur linliga uppgerð, men tað mundu partarnir tó leggja vertin á. Ikki minst gestirnir munnu fegnast um javnleikin, sum gav atgongd til fjórðingsfinalurnar, men nógv bendir á, at hetta verður endastøðin hjá liðnum.

Í øllum førum háttaði lutakastið tað soleiðis, at EB/Streymur skal til Vágs at spæla, og tó at liðið í fjør stóð seg rættiliga væl ímóti VB, so er munurin á pappírinum tó somikið stórur, at hetta talar fyri einum heimasigri.

Gøtumenn høvdu sum vinnarar av bólkinum nakað betri fortreytir undan lutakastinum, men nakran léttan dyst fingu teir so undir ongum umstøðum. Tað var greitt, undan lutakastinum, at talan fór at gerast um heimadyst móti antin B36 ella B68, so léttan dyst gjørdist talan á ongan hátt um, tó at hagtølini tala fyri, at B36 vildi verið meira hóskandi hjá gøtumonnunum.

Soleiðis gjørdist tó ikki. Talan verður um eysturoyaruppgerð í fjórðingsfinaluni, og skuldi GÍ vunnið hesa, bíðar eftir øllum at døma enn eitt eysturoyarlið. Treytað av, at NSÍ vinnur sína fjórðingsfinalu, so talan verður í øllum førum um eina strævna leið fram til finaluna, um GÍ skuldi komið somikið langt í ár.

**Dysturin í tølum**
GÍ-FSV 0-0

## Brasiliumenninir komnir



*Her standa teir so. Silva og Cleyton, sum komandi árið skulu hjálpa FS Vágum at vinna sætið í bestu deildini aftur*

So komu teir loksins. Brasiliumenninir hjá FS Vágum.

Tað er longu nakað síðani, at vit kundu siga frá, at vágamenn høvdu styrkt um hópin við tveimum útlendskum leikarum, men tað hevur gingið nakað striltið at fáa hesar til landið. Pappírini hava annars ligið klár og bíðað nú í einar tvær vikur, og onkur var farin at smílast, tá spurt varð um leikararnar, men sunnudagin komu teir so loksins til landið.

Teir báðir brasiliumenninir verða róptir Silva og Clayton, og er ætlanin, at ter skulu styrkja liðið í hvør sínum enda av vøllinum.

Silva kann helst nýtast á flest øllum plássunum á liðnum, men skal eftir ætlan stýra verjupartinum, meðan Cleyton hinvegin skal gera um seg í álopspartinum, soleiðis at vágoyggin kann skjótast upp í bestu deildina, áðrenn undirstjóvartunnilin um Vestmannasund gerst veruleiki.

TB-FSV 1-1 (0-0):

# FS Víðari

**Vágamenn fingu annað stigið við sær av Tvøroyri, og tryggjaðu sær sostatt seinasta atgongumerkið til fjórðingsfinaluna**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Treytirnar vóru greiðar, tá TB og FSVágar hittust á Sevmýri leygardagin. Tað var longu undan dystinum greitt, at EB/Streymur hevði fingið stig í Gøtu, og tí skuldi heimaliðið vinna dystin, um teir skuldu vinna seg víðari úr bólkaspælinum, meðan gestirnir hinvegin kundu standa seg við javnleiki, um Skála ikki fekk nakað úr dystinum í Havn.

### Trýst frá TB

Fyrra hálvleik var tað eisini heimaliðið, sum átti størsta trýstið. Kanska var talan ikki um so øgiliga væl skipað fótbóltsspæl, men talan var tó um eitt ávíst trýst, sum tó ikki kastaði nakrar opnar málmøguleikar av sær.

Gestirnir royndu hinvegin í størstan mun at halda fast í verjupartinum, meðan teir ikki løgdu so øgiligt fyri í álopspartinum, men í seinna hálvleiki tók tó spakuliga at bragda hjá teimum.

Spakuliga otaðu teir seg longur niðan á TB-hálvuna, og stutt inn í seinna hálvleik løgdu teir seg eisini á odda. Hetta kom, eftir at Jens Erik Rasmussen í fyrsta umfari hevði roynt seg við skotið av brotsteigarmarkinum. TB-málverjin bjargaði, men hann helt ikki skotinum, og so var Bjarni Prior fyrstur á returinum.

Hetta fekk aftur gestirnar at leggja seg longur aftur á vøllin, og so var talan um eitt trýst frá heimaliðnum, tað sum eftir var.

Eitt mál spurdist eisini burtur úr hesum, tá dómarin bríkslaði fyri brotssparki, tá hann metti, at hond var á bóltinum inni í brotsteiginum. Vágamenn vóru alt annað enn fegnir um avgerðina, men mótmælini hjálptu lítið, og Zoran Mancic var ósvikaliga tryggur, tá brotssparkið skuldi skjótast.

Seinastu 20 minuttirnar av dystinum ráddi soleiðis um hjá TB at fáa enn eitt mál, men hóast nógv trýst, so eydnaðist teimum ongan tíð at koma fram til teir heilt stóru málmøguleikarnar.

Vágamenn fréttu undir dystinum eisini úr Havn, hvussu málini hjá HB skolaðu inn móti Skála, og tí vistu teir, at javnleikurin var nóg mikið. Eisini hóast onkur eftir dystin hevði hug at ivast í, hvussu alt hetta við trý'arum og meira skuldi gerast upp, nú bólkaspælið var lokið.

Hvussu er og ikki, so eru vágamenn nú í fjórðingsfinaluni, og tó at mótstøðan her kann tykjast dekan ov sterk, so fara teir við góðum treysti til Runavíkar fríggjadagin komandi.

**Dysturin í tølum**
TB-FSV 1-1 (0-0)
0-1: Bjarni Prior
1-1: Zoran Mancic



# KÍ uttan dystarvenjing í tvær vikur

**B68 segði takk fyri seinast og syrgdi fyri, at KÍ fyri fyrstu ferð nakrantíð ikki megnaði at spæla seg úr bólkaspælinum og í fjórðingsfinaluna**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Fróði Benjaminsen skoraði tvey av málunum hjá B68, tá teir á heimavølli sendu KÍ úr steypakappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

B68 hevur ongantíð verið nakað serligt steypalið. Men hesa ferð var eingin ivi. Á Svangaskarði vunnu teir leygardagin 4–1 ímóti KÍ. Tað var sama úrslit, sum KÍ vann heimadystin ímóti B68 við. Harvið kann sigast, at B68 segði takk fyri seinast.

B68 sigurin hevur við sær, at teir skulu spæla í fjórðingsfinaluni. Tann fyrra verður longu fríggjadagin. KÍ tapið hevur við sær, at teir fyri fyrstu ferð, síðani steypakappingin varð skipað í bólkum, ikki hava megnað at koma í fjórðingsfinaluna. Í fjør var KÍ í finaluni. Tapið á Svangaskarði ber við sær, at í hvussu so er annar finalisturin verður nýggjur, tá ólavsøkufinalan skal spælast.

KÍ tapið ber við sær, at klaksvíkingar ikki fáa góða dystarvenjing, áðrenn teir skulu royna seg í fyrsta umfarinum í landskappingini. Tað er óheppið fyri teir, men teir kunnu gleða seg um, at mótstøðuliðið í fyrsta umfarinum – Skála – heldur ikki fær dystarvenjingina.

At klaksvíkingar ikki megnaðu at koma sær í fjórðingsfinaluna var fyrst og fremst, tí teir heilkiksaðu báðu ferðirnar ímóti Skála. Um tað verða nervar á heimavliðnum, tá Skála aftur verður á skránni í Klaksvík annan sunnudag, so er einki at siga til tað.

### Spældu fyri møguleikanum

KÍ var ikki serliga væl fyri, tá teir komu á Svangaskarð. Heðin á Lakjuni var leikbannaður, Hjalgrím Elttør var í Onglandi, og onkrir av hinum lyklaspælarunum vóru ikki við, tí teir vóru skaddir.

KÍ royndi at leggja trýst á undan vindinum, og teir vóru onkra ferðina tætt við. Ta einu ferðina vildu teir hava brotsspark, men tað var dómarin ikki samdur við teimum í. Og B68 málverjin Michal Kokoszanek hevði onkra sera góða bjarging.

KÍ fekk eitt mál, men tað vísti seg í 2. hálvleiki ikki at vera nóg mikið. Kurt Mørkøre var hesa ferð í álopinum, og tað var hann, sum átti fríspælingina til málið. Bólturin varð stungin fram ímillum, og Alexander Djordjevic var tryggur.

### Koppaði

Eftir steðgin var B68 nógv betri fyri, enn KÍ var tað. Heimaliðið spældi gestirnir næstan út av vøllinum, og tað var einki at siga til, at úrslitið gjørdist 4–1.

Arnold Joensen syrgdi fyri javnvág í roknskapinum. Eitt lítið korter var farið, tá hann við høvdinum umsetti innlegg frá John Hera Dam, sum var ytstur á miðvøllnum í vinstru. Frank Skytte tykist vera gingin frá 4–4–2 skipanini. Hesa ferð var uppstillingin 3–4–3, og tað riggaði væl hjá B68.

Arnold Joensen átti uppleggið til 2–1 málið. Av baklinjuni í høgru legði hann út frá til Fróða Benjaminsen, sum smekkaði til. 3–1 málið heilfluktaði Øssur Hansen, tá hann akkurát røkk einari langari sending úr høgru.

Fróði Benjaminsen staðfesti sannførandi sigurin við brotssparki. Tíðin var um at vera farin, tá innskifti Kristian Poulsen royndi at bróta ígjøgnum, men varð feldur.

**B68–KÍ 4–1 (0–1)**
0–1: Alexander Djordjevic
1–1: Arnold Joensen
2–1: Fróði Benjaminsen
3–1: Øssur Hansen
4–1: Fróði Benjaminsen br.

HB-Skála 6-2 (2-1):

# Ivaleyst hjá HB

**HB vann tryggan sigur, tá Skála vitjaði leygardagin. Við hesum staðfesti HB oddasessin í bólkinum, meðan Skála hinvegin gjørdist taparin í spælinum um at gerast millum bestu trý'ararnar í bólkaspælinum**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

HB hevði ein at kalla týdningarleysan dyst, tá teir í seinasta umfarinum í bólkaspælinum tóku ímóti Skála á heimavølli. Havnarmenninir høvdu longu tryggjað sær oddasessin í bólkinum, og kundi tí fara óttaleysir inn á vøllin.

Hetta fekk tó ikki venjaran hjá HB at spara nakrar av føstu monnunum, soleiðis sum fleiri høvdu roknað við undan dystinum. Heldur nýtti hann høvið til at gera eina seinastu fínpussing av liðnum, áðrenn dystirnir av álvara fara at telja.

Setningurin hjá Skála var hinvegin sera einfaldur. Ikki minst, tí tað undan dystinum var greitt, at EB/Streymur hevði fingið stig í Gøtu. Í øllum førum skuldi Skála hava eitt stig fyri dystin, um teir skuldu fylgja HB í fjórðingsfinalurnar.

### Stór yvirvág

Tá dysturin varð blástur ígongd, var tó ikki tanmn stóri ivin um, hvat av liðunum var tað betra hendan dagin. HB hevði at kalla alt trýstið, og tó at Jonhard Frederiksberg gav teimum ein skelk, tá hann um miðjan hálvleikin legði Skála og odda, so koppaði hetta ikki heildarmyndini.

Leiðslan hjá gestunum helt sær eisini bara í knappar fimm minuttir. Jón Rói Jacobsen javnaði fyri HB, tá hann stútaði bóltin í kassan, og beint undan steðginum var Uni Arge á rætta staðnum, og beindi bóltin i netið til 2-1.

Í seinna hálvleiki gekk ikki long tíð, áðrenn Andrew av Fløtum hevði økt um munin, og so gekk tað fyri tað mesta bara annan vegin. Rúni Nolsøe økti um munin, áðrenn Dánjal Hansen minkaði við einum væl tiknum frísparki, og tá Skála so eisini fekk tveir mans riknar av vøllinum, gjørdist yvirvágin hjá HB fullkomin seinastu løtuna.

### Sær gott út

Fyri Skála bar tapið við sær, at teir gjørdist taparin í spælinum um atgongumerkið hjá teimum báðum trý'arunum í bólkaspælinum. Javnleikurin, sum EB/Streymur í Gøtu, gjørdi undan dystinum greitt, at trý'arin í bólki 2 fór at hava seks stig, og tí kendu skálamenn sum sagt treytirnar, áðrenn dysturin byrjaði.

Hóast tað sosleiðis gjørdist til eitt skjótt farvæl í steypakappingini, so hevur Skála higartil víst, at teir kanska fara at roynast so hampuliga væl í deildini kortini.

Í fleiri av dystunum hevur spælið verið á eini heilt góðari leið, og sum onkur tekur til, so eiga teir í øllum førum seks trygg stig móti KÍ, so tað kann væl vísa seg, at teir fáa hepni við at greiða setningin fyri kappingarárið.

Hjá HB er setningurin nakað hægri enn tann, hjá Skála, og tó at tú altíð skalt verða varin við at gita, longu áðrenn fyrstu landskappingardystirnir eru leiktir, so er ymiskt, sum bendir á, at HB í ár aftur kann átaka sær vanliga leiklutin í oddinum. Fyrst og fremst hevur felagið nú fingið mongu leikararnir, sum vórðu skaddir í fjør, aftur. Hartil kemur, at liðið í ár tykist kanska betri skipað. Ikki minst tí leikararnir ikki er so nær tengdir at einstakari spælskipan, og tí betri eru førir fyri at lagað spælið eftir mótstøðuliðnum.

Og ikki minst, so hevur liðið í ár helst vandamesta álopið í landinum. Við teimum trimum, Una, Andrew og Jón Rói á toppinum, fáa mótstøðuverjurnar meira enn nóg mikið at gera, og neyvan er tað heilt av leið at rokna við, at samanlagt verður her talan um álopið, við flestu málunum hetta kappingarárið.

**HB-Skála 6-2 (2-1)**
0-1: Jonhard Frederiksberg
1-1: Jón Rói Jacobsen
2-1: Uni Arge
3-1: Andrew av Fløtum
4-1: Rúni Nolsøe
4-2: Dánjal Hansen
5-2: Uni Arge
6-2: Rógvi Jacobsen (br.)